## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Kanska sirm fyrrapartin annars turt og sólglottar, tó mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Maria Guttesen og Petsi Tvørfoss í Losjuni í Gøtu

TÍÐINDASKRIV

Í kvøld, mánakvøldið 26 juni, fara Maria Guttesen og Petsy Tvørfoss at spæla unplugged í Losjuni í Gøtu.

Petsi Tvørfoss, ið gongur á Det Jyske Musikkonservatorium í Århus, fer at leggja fyri, og fer handan klaverið at framføra egin løg.

Eftir framførðsluna hjá Petsi fer Maria Guttesen á pallin, við Petsi sum kórsangarinnu. Maria fer m.a. at spæla løg av nýggju fløguni hjá sær Maria Guttesen: LIVE

Maria og Petsi hava seinastu tíðina havt fleiri konsertir saman í Danmark, har Petsi hevur verið kórdama hjá Mariu. Men konsertin í Gøtu er tann fyrsta, har tær báðar framføra egin løg hvør sær. Men høvið verður eisini hjá áhoyrarunum at hoyra tær syngja saman.

Tær báðar songkvinnurnar mugu sigast at umboða hvør sítt ættarlið, og tí kunnu áhoyrararnir vænta sær eina spennandi og fjølbroytta konsert í Gøtu.

Konsertin verður mánakvøldið 26. juni kl.20.00 í Losjuni í Gøtu.




**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 31 |
| Malta | 34 |
| Tunis | 39 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 23 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1023 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga í útsynning. Eitt lágtrýst, 1006 hPa. vestan fyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týsnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið eystan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/6 kl. 06⁰⁰– 26/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 25/6 kl. $06^{00}$– 26/6 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 49,3 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 16. juni | Mánin næstur jørðini |
| 25. juni | Tendring |
| 1. juli | Mánin longst frá jørðini |
| 3. juli | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juni | 08.02 | 20.30 | 07.02 | 19.30 | 07.17 | 19.45 | 10.02 | 22.30 | 11.02 | 23.30 | 06.17 | 18.45 |
| 27. juni | 08.56 | 21.23 | 07.56 | 20.23 | 08.11 | 20.38 | 10.56 | 23.23 | 11.56 | - | 07.11 | 19.38 |
| 28. juni | 09.46 | 22.10 | 08.46 | 21.10 | 09.01 | 21.25 | 11.46 | - | 00.23 | 12.46 | 08.01 | 20.25 |
| 29. juni | 10.31 | 22.53 | 09.31 | 21.53 | 09.46 | 22.08 | 00.10 | 12.31 | 01.10 | 13.31 | 08.46 | 21.08 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juni | 05.17 | 17.45 | 08.17 | 20.45 | 09.17 | 21.45 | 07.47 | 20.15 | 09.02 | 21.30 |
| 27. juni | 06.11 | 18.38 | 09.11 | 21.38 | 10.11 | 22.38 | 08.41 | 21.08 | 09.56 | 22.23 |
| 28. juni | 07.01 | 19.25 | 10.01 | 22.25 | 11.01 | 23.25 | 09.31 | 21.55 | 10.46 | 23.10 |
| 29. juni | 07.46 | 20.08 | 10.46 | 23.08 | 11.46 | - | 10.16 | 22.38 | 11.31 | - |

5 707265 100029 >